# Miðflokkurin í Eysturoynni og Sandoynni

UPPSTILLING

Miðflokkurin er liðgur við listarnar í Eysturoynni og í Sandoynni. Í Eysturoy sær listin soleiðis út: Jan Højgaard, Toftum, Sæunn Ólavsdóttir Hansen, Saltangará, Arni Abrahamsen, Glyvrum, Bill Justinussen, Glyvrum, Jákup Andrias Jacobsen, Leirvík, Kristian Martin Petersen, Fuglafirði og Vinjard Johansen, Eiði.

í Sandoynni hevur Miðflokkurin trý valevni: Petur Egholm Poulsen, Skopun, Dania Lamhauge, Skopun og Vagn í Geil, Havn

# Sjálvstýrisflokkurin aftur við í Suðuroy

UPPSTILLING

Hesiferð bar til hjá Sjálvstýrisflokkinum at gera lista í Suðroynni, so flokkurin stillar upp í øllum valdømum.

Tey trý valevnini listanum eru: Milson Berg, fiskimaður, Trongisvági, Sonni Djurhuus, lærari, Tórshavn og Rúni Jacobsen, stýrimaður, Tvøroyri.

Sjálvsstýrisflokkurin í Eysturoynni er eisini liðugur við uppstillingina. Tey átta valevnini eru: Hjalmar Juul, Funningi, Jón Ellendersen, Oyrabakka, Pauli Poulsen, Innan Glyvur, Kári P. Højgaard, Saltangará, Lasse Klein, Saltangará, Dánial Petur Hansen, Toftum, Kenneth Rasmussen, Saltangará og Malan Mohr Dahl, Fuglafirði.

# Javnaðarflokkurin í Vágum liðugur

UPPSTILLING

Trý valevni eru á listanum hjá Javnaðarflokkinum í Vágm. Áður hevur Javnaðarflokkurin fingið annan mannin valdan í Vágum, men seinastu árini hava Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin fingið hvør sín valdan.

Tey trý valevndini hjá Javnaðarflokkinum eru: Kristoffur Gaardlykke, Miðvági, Edvard Joensen, Sandavági og Rasmus Niclasen, Sørvági.

# Anfinn bjóðar seg fram

UPPSTILLING

Fólkaflokkurin hevur altíð staðið seg væl í Norðoyggjum og listin hesuferð fer neyvan at broyta tað nógv. Anfinn Kallsberg stillar uppaftur, saman við løgtingslimum floksins.

Listin sær soleiðis út: Petur Hans Joensen, Klaksvík, Anfinn Kallsberg, Viðareiði, Jógvan við Keldu, Klaksvík, Jákup Mikkelsen, Klaksvík, Ólavur Poulsen, Klaksvík og Rúna Sivertsen, Klaksvík. Ólavur Poulsen er nýggjur á listanum tvey fólkafloksnøvn, sum plaga at vera á listanum eru ikki við hesuferð. Tey eru Jógvan Edmund á Geilini, Svínoy og Kristian Fríðrik Olsen, Klaksvík.

Í Eysturoynni eru hesi á listanum: Regin Ellingsgaard, Svínáum, Tummas í Garði, Strondum, Herborg Hansen, Glyvrum, Hanna Jensen, Norðragøtu, Kjartan I. Joensen, Leirvík, Jógvan á Lakjuni, Fuglafirði, Ragnar S. Olsen, Søldafirði og Haldur Vang, Toftum.



*Johan í Kollafirði fær hjálp frá konu, syni og pápa at stilla upp til løgtingsvalið.*

# Konan stillar upp í Suðri og pápin í Norðoyggjum

**Nú skal Hin stuttligi flokkurin takast í álvara. Johan í Kollafirði hevur fingið valevni allastaðni uttan í Sandoynni**

STUTTLIG VALEVNI
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Johan í Kollafirði stillar sjálvur upp í Suðurstreymi og hevur fingið familjuna at hjálpa sær aðrastaðni. Konan stillar upp í Suðuroy, pápin í Norðoyggjum og sonurin í Norðstreymoy.

– Eg havi gjørt eitt slogan, sum eg fari at brúka í valstríðnum: Eg haldi tað, sum hinir lova!

– Politikarar geva vallyfti, men halda tey ikki. Eg gevi einki lyfti uttan at royna at fáa tingini í gjøgnum, sum hinir lova, sigur Johan í Kollafirði.

Og hesin politikkurin krevur, at veljarin hugsar seg væl um, hvussu atkvøtt verður á løgtingsvalinum, Tí logikkurin hjá Johan í Kollafirði er soleiðis:

– Um tú ynskir tær ein tunnil og ein politikari lovar ein tunnil, so skalt tú ikki atkvøða fyri honum, tí hann heldur ikki sítt lyfti og so fært tú ongan tunnil. Men um tú stemmar upp á meg, so syrgi eg fyri at tú fært ein tunnil, tí tað var tað, sum politikarin sum lovaði........

## Bandittar til fólk

Floksformaðurin í Kollafirði er útbúgvin pedagogur og tað heldur hann, gevur honum serligt hegni, sum politikari.

– Eg fái bandittar til fólk. Og eg eri útbúgvin at fáa ein barnagarð at fungera. Tú skilur, hvat eg meini, ha? sigur Johan í Kollafirði.

Hann ásannar samstundis, at hann alla tíðin skal ansa eftir ikki at verða keðiligur og tað kann vera trupult.

Hin stuttligi flokkurin hevur eisini ein annan boðskap, sum er sprottin úr arbeiðinum at savna undirskriftir til flokkin.

– Eg møtti fleiri fólkum, sum søgdu seg ikki tora at skriva undir. Tað er synd og soleiðis eigur tað ikki at vera. Okkara politikkur er eisini, at øll skulu tora.

Johan í Kollafirði hevur eisini kent tað eyðmýkjandi at biðja um undirskiftir frá fleiri hundrað fólkum, men tað krevur vallóg og valskipan.

## Verjir seg móti ósigri

Fyri at binda um heilan fingur og tryggja seg móti einum lemjandi ósigri á løgtingsvalinum, so hevur Hin stuttligi flokkurin úttongkt eina møguliga forkláring:

– Um eg ikki verið valdur so er standurin landinum ikki so ringur, sigur Johan í Kollafirði, sum hesa løtuna gloymdi at vera ordiliga stuttligur.



# Loftmiðlar brynja seg til valstríðið



*Loftmiðlarnir, Sjónvarp- og Útvarp Føroya, hava gjørt valskránna. Eins og undanfarin løgtingsval samstarva stovnarnir um stóra valfundin í Norðurlandahúsinum og sjálvt valkvøldið*
*Mynd: Savnsmynd*

**Útvarp Føroya hevur somu valskrá, sum teir nýttu á løgtingsvalinum í 2002. Sjónvarp Føroya roynir sum nakað nýtt at varpa ljós á tey ymisku valdømini**

VALSTRÍÐIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í dag er seinasta freist at lata vallistarnir inn. Uppgávan hjá flokkunum at finna valevni til løgtingsvalið 20. januar er loyst, og nú fara flokkarnir veruliga at brynja seg til eitt hart og óivað tætt valstríð.

Ein týðandi partur av fyrireikingunum hjá flokkunum er at gera av, hvørji valevni skulu sleppa framat í teimum ymisku valsendingunum, sum verða allan januar mánað.

Leikluturin hjá føroysku fjølmiðlunum í valstríðunum veksur fyri hvørt løgtingsval, og valstríðið hesaferð verður vallað nakað undantak.

Loftmiðlarnir Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya eru lidnir við at leggja valskránna. Stovnarnir hava eins og undanfarin løgtingsval nøkur felags evni, meðan onnur evni víkja frá.

## Sama skrá

Stjórin í Útvarpi Føroya, Jógvan Jespersen, sigur, at Útvarp Føroya hevur valt somu valskrá, sum teir høvdu á seinasta løgtingsvali. – Vit gjørdu eina nýggja skrá til seinasta løgtingsval, og vit hava valt at satsa upp á tað sama hesaferð. Skráin vísti seg at rigga væl, og tí royna vit hana aftur, sigur Jógvan Jespersen.

Útvarp Føroya leggur til brots fríggjadagin 9. januar, tá tað verður skipað fyri einum politiskum orðaskifti, har allir flokkarnir verða umboðaðir. Frá 10. til 17. januar er ein dagur settur av til hvønn flokkin. Sjey flokkar stilla upp til løgtingsvalið 20. januar, og Útvarp Føroya hevur sett eina viku av sendingarnar um teir ymisku flokkarnar.

Dagarnir eru skipaðar soleiðis, at fyrrapart svara tvey umboð fyri hvønn flokk spurningum frá lurtarum í eini beinleiðis sending. Klokkan 17.30 sleppa flokkarnir at hava eina framløgu av valskránni. Eftir tíðindini um kvøldið er sendingin ,Í andgletti, á skránni. Formenninir í teimum ymisku flokkunum skulu í hesi sending svara spurningum frá útvarpsfólki. Eftir hesa sending sleppa umboð fyri hinar flokkarnir at seta flokkinum spurningum í eini beinleiðis útvarpssending.

Jógvan Jespersen sigur, at umframt fokus á tann einstaka flokkin, ætlar Útvarp Føroya eisini at gera dagligar reportasjur kring landið, har lurtarin fær høvið til at hoyra, hvat rørir seg kring landið í døgunum undan løgtingsvalinum

## Fokus á valdømini

Sjónvarp Føroya hevur sett sjey kvøld á rað av til á valdømini. Hesar sendingarnar eru skipaðar so, at flokkarnar velja umboð fyri úr hvørjum valdømi at kjakast. Komandi leygarkvøld verður fyrsta sendingin. Úr Sjónvarpi Føroya verður sagt, at endamálið við hesum sendingum er at lýsa bæði lokalu og landsdekkandi síðuna av politikki. Umframt fokus á valdømini, fer Sjónvarpið eins og undanfarin løgtingsval at skipa fyri sendingunum Tinggáttin og Formanskjaki. Tinggáttini er skipað sum kjak millum formenninar í flokkunum og tveir journalistar úr SVF. Í sendingini, Formanskjak, skulu formenninir kjakast við floksformenninar úr hinum politisku flokkunum.

## Felags fundir

Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya fara hetta valstríðið at samstarva um stóra valfundin í Norðurlandahúsinum. Valfundurin í Norðurlandahúsinum er settur til 18.januar, og tá er ætlanin at skifta orð um fimm høvuðsevni. Evini hetta sunnukvøldið verða: Ríkisfelagsskapur og sjálvsstýri, Vælferð og trivnaður, Menning og skúli, Samferðsla og økismenning og Vinna og búskapur.

Valkvøldið týsdagin 20. januar verður sum vant í Norðurlandahúsinum, og tá fara bæði ÚF og SVF at senda beinleiðis.

Jólasøga úr Lund:

# Brandbilar komu eftir røstum royki

**Ein lesandi føroyingur í Lund í Svøríki hevði um jólini familjuna á vitjan, og 1. jóladag ótu tey ræst kjøt. Hugnin fekk eina vend, tá fýra brandbilar komu í túnið, tí grannar høvdu klagað um royk ella eld. Talan var um ræstan royk, men hvørki grind ella eld**

JÓLAHENDING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ein lesandi føroyingur í íbúðarblokkinum Studentlykkan í Lund í Svøríki hevði um jólini familjuna á vitjan. Foreldrini, bróðirin og kona hansara vóru á vitjan, og 1. jóladag ótu tey ræst kjøt, sum ikki er óvanligt í Føroyum, men kanska heldur forkunnugt í Lund.

Familjan hugnaði sær, men eftir lítlari løtu bankaði heldur harðliga á dyrnar, og uttanfyri stóðu tveir brandmenn og úti í túninum stóðu fýra blinkandi brandbilar.

Tað vísti seg, at teir høvdu fingið fráboðan um eld á 3. hædd á Råbyvangen.

– Søgurnar eru mangar um, at føroyskur matur er ikki so væl dámdur í londunum kring okkum, og tað gekk ikki long tíð, áðrenn vit fullu til ró og bara kundu flenna at støðuni. Og brandmenninir fingu boðið ein ræstan bita, kjøt og riv, men takkaðu »Fy faaan, nej«, »Er det mat??«, og hildu so leiðina heim, frætta vit frá føroyingunum í Lund.

Talan var ikki um eld, men bert ræstan royk.